# Fjord Line stórt hall í 2005

**Reiðaríið, sum Smyril Line ætlaði at keypa meirilutan av, hevur júst niðurskrivað partapeningin úr 104 í 2 mió. krónur**

SKIPARAKSTUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Seinasta heyst ætlaði Smyril Line at seta 50 mió. norskar krónur í Fjord Line sum partapening. Tað hevði givið føroyska felagnum 66 prosent av partapeninginum í norska felagnum, sum sostatt hevði verið dótturfelag hjá Smyril Line, sum kortini vendi ætlanini bakið…*

Árið í fjør royndist illa hjá norska reiðarínum Fjord Line. Roknskapurin, sum varð lagdur fram á aðalfundi í Bergen fyrradagin, vísti, at raksturin hevði givið 276,9 mió. norskar krónur í halli. Aftan á skatt og niðurskrivingar gjørdist nettoúrslitið 206,4 mió. krónur í hall.

Leiðslan legði uppskot fyri aðalfundin um at styrkja felagið fíggjarliga, og tað bleiv samtykt. Eftir samtyktini verður eitt lán upp á 50 mió. krónur umlagt til partapening. Samstundis verður verandi partapeningurin, sum er 103,7 mió. krónur, niðurskrivaður til 2 mió. krónur. Tað ber í sær, at hvørt partabræv áljóðandi 5 krónur verður 10 oyru vert, og við hesum broytingum verður partapeningurin í felagnum 20 mió. krónur.

Í ársfrágreiðingini til aðalfundin varð greitt frá, at felagið hevði mist nógv ferðafólk til Color Line á rutuni til Danmarkar, samstundis sum teir gomlu eigararnir kunngjørdu, at teir ætlaðu at selja seg úr felagnum. Í november eydnaðist at fáa nýggjar eigarar í felagið, so tað kundi halda fram.

Samstundis eru umfatandi sparingar framdar, soleiðis at tær árligu úreiðslurnar eru einar 100 mió. krónur minni nú. Tað kemst millum annað av, at 115 ársverk eru spard burtur. Ætlanin er at skarva 40 mió. krónur av rakstrarútreiðslunum afturat, og tað fer at kosta 30 og 35 starvsfólkum arbeiðið.

**Dótturfelag hjá Smyril Line**

Seinasta heyst ætlaði Smyril Line at seta 50 mió. norskar krónur í Fjord Line sum partapening. Tað hevði givið føroyska felagnum 66 prosent av partapeninginum í norska felagnum, sum sostatt hevði verið dótturfelag hjá Smyril Line.

Thomas Magnussen, sum tá var nevndarformaður í Smyril Line, segði tá, at ætlanin fór at geva Smyril Line nýggjar inntøku- og vakstrarmøguleikar. Seinni slepti Smyril Line ætlanini at seta pening í Fjord Line. Thomas Magnussen, sum nú er stjóri í Smyril Line, vil ikki gera viðmerkingar til roknskapin hjá norska felagnum. Hann heldur ikki, at tað hevði verið rætt av sær, og haraftrat hevur hann tagnarskyldu í sambandi við samráðingarnar við Fjord Line í fjør.

# Nýggjur festivalur við alskyns tónleiki

**Í døgunum 25. og 26. august verður Fjarðafestivalurin hildin í Kelduni í Skálafirði. Á hesum tónleikafestivalinum fara bæði føroysk og útlendsk nøvn at luttaka**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*



*Menninir aftanfyri Adore Music – vinstrumegin Tummas Jákup Høj, Pól Frits Høj, Terji Vestergaard, Vinjard Johansen og Eyðun Jacobsen – bjóða til nýggjan tónleikafestival í Kelduni*

**Skálafjørður:** Á festivalinum fer nógv spennandi at fara fram, bæði uttandura og innandura konsertir, eins og eitt stórt barnatiltak.

Tað er Adore Music í stendur aftan fyri festivalin, og verður meira at hoyra um hendan festival í næstu viku. Frá Adore Music verður sagt, at øll kunna gleða seg til ein stóran og spennandi festival har allir aldursbólkar fáa sín sjangru at hoyra.

Fjarðafestivalurin fer at hava tveir pallar uttandura og ein inni, so íalt verða talan um tríggjar pallar.

Fyrireikingarnevndin er mannað við hesum fólkum: Tummas Jákup Høj, Pól Frits Høj, Terji Vestergaard, Vinjard Johansen og Eyðun Jacobsen.

Í næstu viku byrja fyrireikararnir at kunngerða, hvørji nøvn fara at luttaka á hesum festivalinum.

